## NØVN Í VIKUNI

# Sigrid Andreassen 90 ár



Sunnudagin, 16. februar, verður Sigrid Andreassen, f. Mikkelsen, í Sørvági 90 ár. Sigrid er fødd og uppvaksin í Gásadali. Sum ung tænti hon í Vestmanna. Hon giftist í 1947 við Niels Jacob Andreassen (1909-1974) í Sørvági. Tey búsettust í Sørvági, og saman fingu tey tvær døtur, onnur býr í Miðvági og hin í Havn. Niels Jacob sigldi við ymiskum skipum skipum í umleið 50 ár. Hóast sín høga aldur er Sigrid sera áhugaverd at tosa við og minnist væl. Undir krígnum ansaði hon eftir skipum og flogførum í Gásadali fyri bretska hervaldið. Einaferð hon hevði verið eftir torvi saman við nøkrum vinkonum, og tær vóru á veg heim aftur, komu tær, uttan at vita av tí, inn á avbyrgt øki á Vatnsoyrum, har tær vórðu tiknar av bretsku løgregluni. Tær høvdu einki pass og dugdu lítið av enskum. Nú vóru góð ráð dýr. Tá spyr Sigrid eftir bretska trygdarovastanum, ið helt til í Sørvági. Tað var maðurin, ið hon rapporteraði til, um hon sá okkurt skip ella flogfar. Tá teir hoyrdu at hon kendi trygdarovastan, sluppu tær leysar beinanvegin.

Føðingardagurin hjá Sigrid verður hildin hjá dóttrini Poulu Joensen í Miðvági sunnudagin eftir kl. 16.

**m.g.**

# Elsa Jacobsen 75 ár



*Elsa Jacobsen saman við synunum Jákup (v.m.) og Johannes Lemita*

Tann 15. februar verður Elsa Jacobsen í Norðragøtu 75 ár. Elsa er útbúgvin sjúkrasystir og jarðarmóðir. Hon fór í 1960 til Etiopien sum trúboðari, har hon virkaði í 32 ár, til hon kom heim aftur í 1992. Hon hevur uppfostrað tvíburðadreingirnar Jákup og Jóhannes, sum eru úr Etiopien. Mamma teirra doyði undir føðingini, og Elsa tók teir til sín sum sínar egnu synir eftir ynski frá pápanum. Dreingirnar hava eftirnavnið Lemita, ið er fornavnið hjá pápanum, soleiðis sum siður er í Etiopien. Føðingardagurin hjá Elsu verður hildin leygardagin kl.18 í Missiónshúsinum við Landavegin í Havn.

**m.g.**

# Markus Heinesen 80 ár



Fríggjadagin 14. februar, varð Markus Heinesen, vanliga nevndur Markus í Kunoy 80 ár. Markus er føddur og uppvaksin í Kunoy. Hann tók sveinabræv sum snikkari í 1947. Markus og konan, Ásla, giftust í 1950. Í 1954 búsettust tey í Klaksvík. Ásla og Markus eiga 7 børn. Markus hevur bygt nógv sethús og almennar bygningar í Klaksvík. Í dag búgva hjúnini í Haraldsundi. Markus hevur stóran áhuga í seyðahaldi, og hava tey nakað av seyði, ið Markus við ídni, hegni og áhuga røkir.

# Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**



Kennir tú onkran í familjuni,
á arbeiðsplássinum, í grannalagnum
ella hvar tað skal vera, ið hevur ein
merkisdag sum t.d. rundan
føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag
ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv
ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:..........................................................................................
Bústaður:.....................................................................................
Bygd/býur:.......................................................Tel:...................................
Evt. arbeiðspláss:..........................................................................

Merkisdagurin er: ..........................................................................

Innsendari: ..........................................................Tel:.............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 311820/216135, fax 314720, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo

# Geir Wardum leiðari á tveimum Shellstøðum




Geir Wardum er settur sum leiðari á Shellstøðini á Frælsinum og á Shellstøðini við Ringvegin í Havn. Geir er 37 ára gamal og havnarmaður. Áðrenn hann fyrstu ferð kom til Shell í 1986 at koyra tangabil, hevði hann arbeitt á Restorffs Bryggjarí í fleiri ár. Eftir at hava koyrt tangabil í eitt ár var hann leiðari á eini smyrjioljuverksmiðju hjá Dansk Shell í Keypmannahavn frá 1987-93. Frá 1995-96 var hann á skrivstovuni hjá Shell á Viðarnesi í Havn. Hann var leiðari á Shellstøðini í Gøtudali frá 1996 til 2000. Síðan hevur hann arbeitt sum bókhaldari á egnari tannlæknastovu í Klaksvík. Geir hevur eisini tikið merkonomskeið í roknskaparlæru, virkisbúskapi og rakstrarbúskapi.

**m.g.**

# Gullbrúdleyp á Glyvrum

Í dag, 15. februar, hava hjúnini Jodvig, f. Joensen, og Jakku Jacobsen á Glyvrum gullbrúdleyp. Jodvig er fødd og uppvaksin á Skipanesi og Jakku er av Glyvrum. Tey giftust í 1953 og búsettust á Glyvrum. Jakku sigldi sum ungur, áðrenn hann fór at arbeiða sum húsasmiður. Hann hevur, saman við øðrum, arbeitt sum húsasmiður kring landið. Jodvig og Jakku eiga fimm døtur. Tvær av døtrunum búgva á Skipanesi og tríggjar á Glyvrum. Dagurin verður hildin í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag kl. 17 fyri innbodnum. Eftir kl. 21 er opið hús, har øll, ið hava hug at gleðast saman við teimum, eru vælkomin.

ítróttur

Nr. 32 • leygardagur • 15. februar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Niclas bjóðar Børge av



*Børge B. Hansen hevur í 25 ár verið partur av nevndararbeiðinum hjá FSF, men líkt er til, at hann noyðist ígjøgnum stríðsval, um hann eisini skal vera í nevndini eftir komandi aðalfundin*

**Fyrrverandi FIFA-dómarin, Niklas á Liðarenda, verður av GÍ skotin upp sum mótvalevni hjá Børge B. Hansen, tá FSF-aðalfundurin skal verja nýggjan varaformann**

FÓTBÓLTSVAL
*Jákup Mørk*

Komandi vikuskifti verður aðalfundurin hjá FSF, og sum eitt av føstu punktunum á skránni standa nakrir av nevndarlimunum fyri vali.

Av vanligu nevndarlimunum standa Óli Holm og Jens Erik Magnussen fyri vali, og sum skilst stilla teir báðir upp til afturval. Hartil hevur Royn skotið upp, at Sveinbjørn Dánjalsson skal veljast í nevndina.

Eisini stendur Børge Barclay Hansen fyri vali. Børge hevur í fjórðingsøld verið partur av nevndararbeiðinum í føroyskum fótbólti. Eitt avrik, sum hann í vetur fekk heiðursprógv frá ÍSF fyri, men hóast hetta, so tykist hann ikki hava nakrar beinleiðis ætlanir um at pensionera seg sjálvan.

Einsamallur verður hann tó ikki í uppskoti, tá varaformaðurin skal veljast. Av skrivstovuni hjá FSF verður nevnliga váttað, at Niclas á Liðarenda er stillaður upp sum mótvalevni. Tað er GÍ, sum hevur skotið fyrrverandi FIFA-dómaran upp til hetta, og einki er at ivast í, at hann hevur góðar møguleikar at verða valdur.

Ígjøgnum dómarayrki sítt hevur hann í øllum førum fingið stóran persónligan kunnleika til flest øll fótbóltsfeløg í landinum, soleiðis at hesi væl og virðiliga vita, hvat persónurin stendur inni fyri. Sum dómari og limur í dómarafelagnum hevur hann hann eisini í fleiri ár verið ein av drívmeginum aftan fyri arbeiðið at fáa dómarastættina til ein meira viðurkendan lim í fótbóltsfamiljuni, og síðst men ikki minst, so kann kanska júst hann verða rætti maðurin at endurskapa samstarvsstevið millum FSF og Fótbóltsdómarafelagið. Eitt samstarv, sum fekk nøkur álvarslig skot fyri bógvin fyri nøkrum árum síðani, men sum hóast alt er batnað nógv aftur.

## Fá innkomin mál

Vanliga er tað so, at tað eru hampuliga nógv mál, sum verða tikin upp til støðutakan á aðalfundinum hjá FSF, men sum eitt undantak tykist hetta ikki vera galdandi í ár.

Treyðugt so, so verða helst nøkur mál til viðgerðar. Eitt nú tryggingarmálið, har tað við seinasta aðalfund varð álagt nevndini at finna fram til, hvørt tað ber til at skipa eina samlagstrygging millum føroysku feløgini, sum bæði tryggjaði leikarar og feløg. B71 hevur eisini áður verið frammi við, at tey ætla sær at leggja uppskot um broyting av dystunum um upp- og niðurflyting, soleiðis at tað framyvir bert verður talan um hin eina dystin í hesum førunum.

Hartil verða so eisini tey ymsu føstu málini so sum góðkenning av roknskapi, var av grannskoðara v.m. á skránni, og tó at hesi ikki plaga at krevja so øgiliga drúgva viðgerð, so er fíggjarligi parturin ein alsamt vaksandi partur av fótbóltinum, og tí eisini nakað, sum í alt størri mun viðkemur ymsu feløgunum.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 16.02 | 14.30 | Kyndil-VB |
| 16.02 | 14.30 | Tjaldur-VÍF |

1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 15.02 | 16.00 | KÍF-StÍF |
| 16.02 | 16.00 | H71-Kyndil |
| 16.02 | 16.00 | Tjaldur-VÍF |

**Flogbóltur**

Steypafinala kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 15.02 | 14.30 | TB-ÍF |

Steypafinala menn

| | | |
|---|---|---|
| 15.02 | 16.30 | SÍ-ÍF |

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v j t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 3 | 3 - 0 - 0 | 385 | 318 | 67 | 15 |
| 2 | VÍF | 4 | 2 - 1 - 1 | 370 | 305 | 65 | 13 |
| 3 | Kyndil | 3 | 2 - 0 - 1 | 364 | 364 | 0 | 10 |
| 4 | Stjørnan | 3 | 1 - 0 - 2 | 317 | 319 | -2 | 10 |
| 5 | Neistin | 4 | 1 - 0 - 3 | 315 | 342 | -27 | 7 |
| 6 | StÍF | 3 | 0 - 1 - 2 | 350 | 380 | -30 | 7 |
| 7 | Tjaldur | 2 | 1 - 0 - 1 | 280 | 353 | -73 | 3 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v j t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 3 | 2 - 0 - 1 | 465 | 379 | 86 | 13 |
| 2 | StÍF | 2 | 1 - 1 - 0 | 401 | 348 | 53 | 12 |
| 3 | Neistin | 3 | 1 - 1 - 1 | 422 | 392 | 30 | 12 |
| 4 | Kyndil | 2 | 0 - 1 - 1 | 368 | 373 | -5 | 7 |
| 5 | KÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 383 | 414 | -31 | 7 |
| 6 | H71 | 3 | 2 - 0 - 1 | 385 | 434 | -49 | 7 |
| 7 | Tjaldur | 2 | 0 - 1 - 1 | 348 | 432 | -84 | 4 |